Søljan-Neistin 21-28(8-13)

# Neistin fer við bronsuni

**Alt bendir á, at tað verða neistakvinnurnar, sum fara avstað við bronsuni í ár, eftir at tær týskvøldið vunnu á nærmastu kappingarneytunum úr Søljuni**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Við 28-21 sigrinum á Søljuni á Giljanesi týskvøldið hevur Neistin at kalla tryggjað sær bronsuna í Sunset-kappingini*

*savnsmynd*

Spenningurin í Sunset-kappingini hjá kvinnum í ár hevur fyrst og fremst verið um, hvørt tað verður Stjørnan ella VB, sum vinnur gull, og um tað verður Neistin ella Søljan, ið fer avstað við bronsuni. Nú sær út til, at kappingin um bronsumerkini er avgjørd.

## Eingin ivi

Týskvøldið hittust Søljan og Neistin í høllini á Giljanesi, og teir gott og væl 100 áskoðararnir kundu staðfesta, at tær bláu úr Havn høvdu munin á heimaliðnum.

Gamaní gekk tað javnt á fyrsta korterið, men tað var greitt, at Neistin hevði fleiri streingir at spæla uppá, og so hvørt sum dysturin leið, vísti hetta seg eisini aftur á máltalvuni.

Heimaliðið fylgdi við fram til gott og væl hálvan fyrra hálvleik, men so setti Neistin ferð á, og við fimm skjótum málum á rað løgdu tær seg á odda 12-6, og so var ilt at ímynda sær, at heimaliðið skuldi megna at svara aftur.

Tað skal tó sigast, at Søljan gav ikki skarvin yvir, tí heimaliðið stríddist manniliga, og eftir steðgin fingu tær eisini tikið seg nakað inn aftur á gestirnar, soleiðis at munurin eitt skifti tíðliga í seinna hálvleiki einans var tvey mál, men nærri kom Søljan ikki.

Neistin hevði munin og var væl betra liðið, og hetta sást serliga væl aftur seinasta korterið av dystinum, har tær av álvara løgdu sjógv millum seg og Søljuna og vunnu dystin greitt 28-21.

Við sigrinum tykist spenningurin um, hvør ið fer avstað við bronsuni, verða av, tí Neistin er nú fýra stig framman fyri Søljuni, sum tó hevur leikt ein dyst minni. Harumframt hevur Neistin, um liðini skuldu enda jøvn í stigum, væl betur málmun enn vágaliðið.

Søljan-Neistin 21-28(8-13)
Søljan: Nicoleta Radu Hansen 9(1), Heidi Maria Akselsen 4(1), Fía Selma Nielsen 3, Arnleyg Haraldsen 1, Herta J. Simonsen 1, Una á Steig 1, Petra Thomassen 1, Lina Andriulyte 1
Neistin: Simona Petersen 11, Ása á Neystabø 5, Marjun Tróndarson 5(2), Lív Sørensen 4, Annika Thomsen 3
Brotskøst: Søljan 2(2), Neistin 3(2)
Útvísingar: Søljan 4, Neistin 8
Dómarar: Brandur Johansen og Heri Petersen
Áskoðarar: 109

# Flaggdagsrenning tann 25. apríl

Eins og undanfarin ár fer Bragdið aftur í ár at skipa fyri renning á Flaggdegnum. Byrjað verður við Gamla Apotek kl. 16.00, og er tað beint eftir hugnaliga flaggdagshaldið á Vaglinum í Havn.

Kappingin er fyri børn og vaksin. Gjørt verður vart við, at øll - skjót og minni skjót, ung og eldri - eru vælkomin. Vaksin renna 7,02 km. og børn, fødd í 1992 - 1998, renna umleið 1,8 km.

Umframt at vera ein kapping fyri einstaklingar er Flaggdagsrenningin eisini ein kapping ímillum virkir, stovnar o.t., nevnd firmakapping.

Firmakappingin er skipað á tann hátt, at virkini v.m. kunnu tekna 3-5 vaksnar luttakarar á hvørjum liði, ið so kappast ímóti hvørjum øðrum. Fleiri lið kunnu luttaka frá hvørjum virki. Menn og kvinnur skulu luttaka á hvør sínum liði. Bert tríggjar tær bestu tíðirnar á hvørjum liði telja við í kappingini.

Gentir og dreingir - føðiár frá og við 1992-1998, renna 1,8 km.

Kvinnur og menn - føðiár frá og við1960-1991, renna 7,02 km

Veteranar kvinnur og menn - føðiár til og við 1959, renna 7,02 km

Eftir at komið er á mál fáa allir luttakararnir frukt og Poptop. Stuðlað hesum hava ávikavist P/F Poul Hansen, MBM og Føroya Bjór.

Vinnandi lið og einstaklingar fáa steyp til ognar. Harumframt verða heiðursmerkir latin til nr. 1, 2 og 3. Høvuðsstuðul til Flaggdagsrenningina er P/F Føroya Shell, sum eisini letur steyp og heiðursmerki. Aðrir stuðlar eru Føroya Sparikassi, MBM og Trygd.

## »Jubilæum«

Hetta er 19. Flaggdagsrenning og tey sum luttaka fyri 10. ella 15. ferð í hesi kapping, fáa heiðursbræv.

## Tilmelding

Síðsta freist at melda til einstaklingakappingina er mikukvøldið tann 20.04 kl. 1800. Áhugað kunnu tekna seg umvegis heimasíðuna hjá FÍF: http://www.athletics.fo/. Fyrispurningar hesum viðvíkjandi kunnu setast Niels Jákup Jakobsen, tlf. nr. 317854/254027, ella Robert Vilhelmsen tlf. 545108.

Tað verður ikki møguligt at melda seg til á staðnum beint undan kappingini.

## Gjalding

Luttøkugjaldið fyri vaksin er kr. 60 og fyri børn kr. 30. Luttøkugjaldið skal flytast á konto hjá Bragdinum: 6460 166.239.4. Tilmeldingin er ikki galdandi fyrrenn gjaldingin er farin fram.

## Avheintan av startnr.

Startnr. og annað skal heintast í ÍSF-húsinum hósdagin 21.4. millum kl. 16 og 18.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum byrjar renningina.

Renningin byrjar við, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sigur nøkur orð, letur startskotið ganga og rennur síðani við hópinum.

Vinarliga
Bragdið - Felag fyri frælsan ítrótt í Streymoy

SUNSET KAPPINGIN
KVINNUR

## Sunset-kappingin

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 512 | 364 | 148 | 23 |
| 2 | VB | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 584 | 350 | 234 | 21 |
| 3 | Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 565 | 425 | 140 | 18 |
| 4 | Søljan | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 500 | 445 | 55 | 14 |
| 5 | VÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 436 | 447 | -11 | 7 |
| 6 | StÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 424 | 490 | -66 | 7 |
| 7 | Kyndil | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 382 | 503 | -121 | 7 |
| 8 | Tjaldur | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 282 | 661 | -379 | 0 |

# Vágingur skal venja gøtumenn

Vágbingurin John Eystsberg er settur sum venjari hjá 2. deildarliðnum hjá GÍ. John Eystberg var í mong ár fastur fúsur á besta liðnum hjá VB.

Umframt at venja teir næstbestu hjá gøtumonnum skal John Eystberg, sum er búsitandi í Havn, eisini venja bæði unglingarnar og dreingirnar hjá GÍ. Nógv bendir eisini á, at John Eystberg sjálvur skal verða við á vøllinum, tí tá ið 2. deildarliðið um vikuskiftið leikti venjingardyst, taldi John Eystberg millum málskjúttarnar hjá GÍ.

tn